VB-Kyndil 23-16 (10-10):

# Tungt hjá Kyndli

**Tá VB eftir steðgin setti ferð á, stóð tað øllum greitt, at Kyndil fer at hava nakrar strævnar vikur í FM-endaspælinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Við at vinna seg fram í ovara bólkin, hevði Kyndil sum so rokkið málinum, sum tær settu sær undan kappingarbyrjan.

Tí munnu spælararnir á liðnum eisini vera nøgdar við avrikið í Vági, hóast teir í seinna hálvleiki vóru greitt við undirlutan í dystinum móti VB.

Fyri steðgin hevði Kyndil annars fylgt væl við, og heimaáskoðararnir mundu eisini ótolnast nakað, tá tað ikki eydnaðist VB at leggja sjógv niður til mótstøðuna.

Men hetta kom í rættlag eftir steðgin. Kyndil fekk at kalla slettist ikki fylgt við, tá veruliga ferð varð sett á seinastu 20 minuttirnar. Tá broyttist støðan frá 14-14 til endaligu 23-16, og tað sigur helst eisini nakað um, at VB hevði eyka gearið í dystinum.

## FAKTA UM DYSTIN

**VB-Kyndil 23-16 (10-10)**
**Málskjúttar**
**VB:** Daiva Toumaite 8(3), Christina Holm 8(5), Rannvá Augustinussen 3, Laila Jespersen 3, Svava Vestergaard 1
**Kyndil:** Jórun S. Ludvig 5, Lina Andriulyta 5, Linda Weihe 2, Anja Heinadóttir 2, Súsanna Petersen 1, Hildur Høghamar 1
**Brotskøst:** VB 12, Kyndil 3
**Útvísingar:** VB 5, Kyndil 6
**Dómarar:** Heri Petersen & Dánjal Samuelsen

StÍF-Søljan 28-18 (14-7):

# StÍF vann stórsigur

**Søljan varð send vestur til Vágar við einum ordans sekki í dag**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað varð mett sum ein av veruliga styrkisroyndunum í niðurflytingardystinum, tá Søljan í dag vitjaði á Skála.

Talan var kanska eisini um styrkisroynd, men so má sigast, at StÍF stóð hesa væl og virðiliga.

Frá byrjan setti heimaliðið seg á dystin, og við trygga sigrinum hava tær í øllum førum skapt sær sjálvum eitt gott útgangsstøði, nú niðurflytingarvandin er heilt sjónligur hjá teimum fýra liðunum, sum dystast í niðara bólkinum.

Fyri StÍF skutu Rebekka Justinussen og Paula B. Jacobsen 6 mál hvør. Louisa Niclassen, Arnleyg Haraldsen og Fía Selma Nielsen skutu 3 mál í part fyri Søljuna.

## FAKTA UM DYSTIN

**StÍF-Søljan 28-18 (14-7)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 6(2), Paula B. Jacobsen 6(2), Guðrun Ólavsdóttir 5, Malan Petersen 4, Ninna K. Johansen 4, Poula D. Olsen 3
**Søljan:** Louisa Niclassen 3, Arnleyg Haraldsen 3(1), Fía Selma Nielsen 3, Jana Jacobsen 2, Hertha Simonsen 2, Heidi Maria Akselsen 2, Irdi Mikkelsen 2, Sólja Jóanisdóttir 1
**Brotskøst:** StÍF 5, Søljan 1
**Útvísingar:** Søljan 4
**Dómarar:** Petur S. Dahl & Hallur Danielsen

Neistin-Stjørnan 21-25 (12-11):

# Sama søgan hjá Neistanum

**Enn einaferð hevði Neistin leingi gott tak á Stjørnuni. Men enn einaferð hevði Stjørnan munin, tá málini veruliga fóru at telja**



*Her hevur Annika Thomsen gott tak á Alinu Olaru, men seinastu 20 minuttirnar varð hetta kortini slept*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað mundi kennast sum okkurt slag av deja-vu hjá Neistakvinnunum. Mest sum hvørja ferð, ið tær hava tikist við Stjørnuna seinastu tvey kappingarárini, hava tekin verið um, at stig skuldu spyrjast burtur úr royndini. Men hóast tekinini hava verið til staðar, so er takið eisini hvørja ferð slept.

Soleiðis var eisini, tá liðini hittust sunnudagin. Fyrstu løtuna tóktust tær á vitjandi liðnum annars at hava eitt gott tak, men spakuliga fekk Neistin liðið at koyra sum eina heild. At Manuela Jensen í málinum eisini tóktist spæla upp móti sínum allarbesta, mundi ikki gera fortreytirnar verri, og uttan at munurin gjørdist tann stóri, so tóktist Neistin kanska hava rakt dagin, har tær loksins skuldu fáa ein sigur á Stjørnuni.

Og tekinini gjørdust ikki kámari, tá farið var út til seinna hálvleik. Ása á Neystabø treivst væl við rúmu teymunum, sum hon fekk frá Stjørnu-verjuni, og tað darvaði eisini spælið hjá teimum reyðu, at Alina Olaru frá fyrsta bríksli varð mansvard.

### Óhepni og vantandi dirvi

At tað so kortini eydnaðist Stjørnuni at vinna ein á pappírinum tryggan sigur, hevði sínar orsøkir.

Fyrst og fremst, so hevur Stjørnan fleiri ferðir í ár prógvað, at liðið altíð hevur trúnna á egnan mátt. Tað vil siga, at hóast tað ikki altíð gongst eftir vild, so megna tær at berja mótgongdina niður. Ein eginleiki, sum í sjálvum sær ber boð um, at talan er um eitt lið, sum bæði kann og vil verða best.

Og so eigur eisini at verða lagt afturat, at Neistin sum so ikki gjørdi júst tann partin av uppgávuni truplari. Tí spurningurin er, hvussu nógv tær bláu í veruleikanum mundu trúgva uppá, at uppgávan kundi loysast. Sjálvandi betraði tað ikki um fortreytirnar, at tvær av avgjørt bestu spælarunum hjá liðnum sunnudagin máttu gevast miðskeiðis í seinna hálvleiki. Manuela Jensen stóð føst á gólvinum, tá hon skuldi venda sær eftir einum bólti, og fáar minuttir seinni noyddist Ása á Neystabø út, eftir at hon datt sera keðiliga í álopsroynd.

Men mest av øllum, so var tað vantandi dirvi, sum hevði við sær, at Neistin ikki fekk hildið fast. Eitt skifti í seinna hálvleiki spældi Neistin við Tvørur ímóti, so eydnaðist tað Stjørnuni at toga eitt mál aftur hesa løtuna, og so tóktist, sum fekk Neistin eitt sálarligt knekk. Stjørnan tók nú alt meira yvir, og tá tær so tvær ferðir á rað kundu skora við kvikum mótálopi, eftir at Neistin hevði misnýtt brotskast, var leyst og liðugt. Enn einaferð hevði Stjørnan víst, at tær megna at toga seg upp, tá tørvurin er størstur.

Sum so var talan ikki um nakra vanlukku fyri Neistan. Soleiðis sum kappingin er skipað, so verður talan undir øllum umstøðum um pláss í hálvfinaluni. Men sálarliga man tað hava stóran týdning, at tað onkursvegna tykist vera ógjørligt hjá teimum bláu at basa Stjørnuni.

## FAKTA UM DYSTIN

**Neistin-Stjørnan 21-25 (12-11)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Ása á Neystabø 6, Annika Ljósstein 4(2), Nicoleta R. Hansen 3(1), Kára á Dunga 2, Annika Thomsen 2, Rakul Augustinussen 2(2), Mia Káradóttir 1, Unn Kragesteen 1
**Stjørnan:** Alina Olaru 9(2), Bára Skaale Klakstein 5, Katarina Stepanov 4, Joan Midjord Djordjevic 3, Una Olsen 2, Louisa Andreasen 1, Anna Kristina Samson 1
**Brotskøst:** Neistin 9, Stjørnan 2
**Útvísingar:** Neistin 6, Stjørnan 4
**Dómarar:** Kristian Johansen & Sámal Paulason. Í nøkrum førum saknaðust fylgirevsingar, tá dømt varð fyri hart spæl

# Ása breyt hondina

**Fýra vikur í gipsi. Tað er støðan, sum Ása á Neystabø má finna seg í, eftir at hon breyt hondina í dystinum móti Stjørnuni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var dyggur smeitur hjá Neistanum, tá Ása á Neystabø tíðliga í seinna hálvleiki mátti gevast í dystinum móti Stjørnuni.

Fram til hetta hevði Áa verið ein av bestu spælarunum á vøllinum. Og hóast onnur viðurskifti eisini gjørdu seg galdandi, so var hetta helst ein av orsøkunum til, at Neistin ikki megnaði at halda fast móti Stjørnuni.

Og sunnukvøldið var so greitt, at tað ikki bara var hendan eina dystin, at Neistin mátti vera Ásu fyriuttan. Á sjúkrahúsinum varð staðfest, at talan er um brot í arminum, og næstu fýra vikurnar verður hesin so í gipsi.

Tað er tó enn møguleiki fyri, at Ása verður at síggja á vøllinum aftur í ár. Soleiðis, sum kappingin hevur lagað seg, so bendir nógv á eina hálvfinalu í FM-stríðnum millum Neistan og VB. Og tá er væl hugsandi, at Ása aftur verður partur av hópinum. Hinvegin er væl hugsandi, at Neistin spælir seg í steypafinaluna móti antin VB ella Stjørnuni, men tann dystin mugu tær so klára seg uttan Ásu.



*Ása á Neystabø verður undir ongum umstøðum við, um Neistin skuldi spælt seg fram til steyapfinaluna í hondbólti*
*Mynd: Álvur Haraldsen*